# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Svartkalvi. Túrur nr. 1222.
# Tíðarskeið: 23/5-6/6 – 2012.

**Fólk við frá Havstovuni:** Rógvi Mouritsen, Petur Steingrund og Jens Arni Thomassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Illicium varð tikið av havtasku.

**Eyka uppgáva:** Tvey hál vórðu tikin við uppsjóvartroli nærhendis Sandoynni (túrur 1223), men eingin makrelur var í, bert rognkelsi.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Thyborøn-lemmar. Trolað varð vanliga í 4-6 tímar.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini 24/5 kl. 21. Vit byrjaðu í norðara kanti av Landgrunninum og fóru síðan eystur- og suðureftir. Fiskaðu allan vegin líka til endan á Munkagrunninum. Gjørdu eisini eitt legg í vestara kant av Munkagrunninum. Sum nakað nýtt máttu vit inn at landa á Toftum mitt á túrinum (mikudagin 30. mai), tí fiskiskapurin var somikið góður. Byrjaðu aftur á endanum á Munkagrunninum og fóru sohvørt norður gjøgnum eystara kant, og endaðu í norðara kanti. Tilsamans 39 hál vórðu tikin og 31 gjørd upp. Veðrið var gott allan túrin. Tóku tvey hál eftir makreli eystan- og vestan fyri Sandoy, og tá vóru eisini støðir tiknar við ætiglúpi. Hesar støðir vórðu skrásettar undir einum øðrum túrnummari (1223). Landaðu í Havn 5/6 kl. 12.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 12. juni 2012.

**Fyribilsúrslit:** Tað var munandi meira at fáa av svartkalva, trantkongafiski, stóra kongafiski, og fleiri øðrum fiskasløgum í mun til 2011 (Talva 1). Hinvegin var minni av t.d. toski og skøtu. Vit fingu ein stóran svartkalva (80 cm) við rennandi rognum, og er hetta ikki áður skrásett við Magnusi Heinasyni. Tað var í norðara kanti. Hetta gevur ábending um, at svartkalvi gýtir undir Føroyum, og at gýtingin hendir í mai/juni. Rognini vóru sera stór, umleið 3,5 mm í diametur, og vóru klár á at líta. Í ár 2000 var ein svartkalvi við rennandi rognum fingin við gørnum á Munkagrunninum.

**Talva 1**. Veiða (kg), og nytrur tiknar á túri 1222. Nytrur vórðu tiknar av svartkalva og illicium ("tráðan") av havtasku.

| FISKASLAG | 2012 31 hál KG | Nytrur | 2011 31 hál KG | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 28855.23 | 490 | 18053.89 | 1.60 |
| TRANTKONGAFISKUR | 8698.48 | | 4618.88 | 1.88 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 3932.14 | | 530.77 | 7.41 |
| TINDASKØTA | 2045.97 | | 6052.74 | 0.34 |
| BROSMA | 1126.10 | | 551.57 | 2.04 |
| UPSI | 952.54 | | 107.87 | 8.83 |
| BLÁGÓMUR | 758.47 | | 526.71 | 1.44 |
| HALAHVASSA SKØTA | 669.59 | | 1256.10 | 0.53 |
| BLÁLONGA | 551.42 | | 96.70 | 5.70 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 403.58 | | 40.55 | 9.95 |
| LONGA | 198.32 | | 53.81 | 3.69 |
| HVÍTASKØTA | 196.09 | | 287.18 | 0.68 |
| SVARTKJAFTUR | 174.07 | | 30.80 | 5.65 |
| GULLAKSUR | 113.85 | | 20.99 | 5.43 |
| LIRI | 103.28 | | 174.04 | 0.59 |
| LÁLLA | 83.25 | | 106.56 | 0.78 |
| KALVI | 34.80 | | 30.25 | 1.15 |
| KLINGRUSKØTA | 25.02 | | 71.72 | 0.35 |
| TOSKUR | 15.31 | | 278.58 | 0.05 |
| HAVTASKA | 12.84 | 2 | 118.87 | 0.11 |
| HVASSASPREK | 11.90 | | 23.23 | 0.51 |
| ULVFISKUR | 11.53 | | 1.74 | 6.61 |
| LÍTLA BROSMA | 6.05 | | 4.62 | 1.31 |
| HAVMÚS | 5.55 | | 0.00 | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 5.01 | | 4.29 | 1.17 |
| STEINBÍTUR | 4.24 | | 0.00 | |
| TINDABAK | 2.44 | | 0.00 | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 1.18 | | 19.79 | 0.06 |
| TANNHØGGUSLOKKUR | 0.47 | | 0.00 | |
| MAKRELUR | 0.16 | | 0.00 | |
| SILVURMURTUR | 0.12 | | 0.00 | |
| LITLA LAKSATOBIS | 0.09 | | 0.00 | |
| RÆKJA | 0.02 | | 0.00 | |
| TILSAMANS | 48999.10 | 492 | | |

Petur Steingrund